## Skeivur búskaparpolitikkur

Tíggju amerikanarar, sum hava fingið Nobelvirðislønina í búskapi, finnast í einari felags fráboðan at seinasta uppskotinum hjá stjórnini um at endurreisa amerikanska búskapin.

Teir tíggju viðurkendu búskaparfrøðingarnir skriva, at uppskotið hjá stjórnini fer ikki at bøta um arbeiðsloysið, og at tað fer heldur ikki at skunda undir búskaparvøksturin. Teir fýlast eisini á, at stjórnin hevur skotið upp at strika skattin á vinningsbýti, tí tað tænir bert einkultum persónum og ikki vinnulívinum, og um skattabroytingarnar annars siga teir, at tær fara at skerja skattainntøkuna hjá tí almenna, sjálvt um tað ikki er ætlanin hjá stjórnini.

Teir tíggju, sum hava skrivað undir fráboðanina, eru Lawrence Klein, Franco Modigliani, Joseph Stiglitz, Paul Samuelson, Kenneth Arrow, Robert Solow, William Sharpe, Douglas C. North, Daniel McFadden og George Akerlof.

## Hann er sum oldurabbin

Nógvir týskarar eru í øðini, eftir at amerikanski verjumálaráðharrin, Donald Rumsfeld, hevur sett Týskland í bás saman við Kuba og Libya. Tað gjørdi Rumsfeld, tá hann fyrradagin varð spurdur, hvørji lond alment hava boðað frá, at tey eru ímóti álopi á Irak.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Rumsfeld hevur tosað heldur niðurlátandi um Týskland. Fyri nøkrum døgum síðani segði hann, at Týskland og Frakland eru trupul sameind at hava við at gera, men at tey hoyra til tað gamla Evropa, sum hann tók til.

Orðalagið hjá amerikanska verjumálaráðharranum er fallið nógvum týskarum fyri bróstið, men týski innanríkisráðharrin, Otto Schilly, royndi í gjár at sissa sínar landsmenn. Hann vísti á, at oldurabbi Rumsfeld var úr Norðurtýsklandi, har fólk hava tað fyri at taka í so rívan til. Oldurabbin hjá amerikanska verjumálaráðharranum var úr einari bygd uttan fyri Bremen.

## Um Kyrrahavið í sevbáti

Amerikanski ævintýrarin Phil Buck hevur sett sær fyri at sigla tvørtur um Kyrrahavið í einum sevbáti. Sjálvur sigur hann, at báturin er tann tryggasti, sum mannahendur nalrantíð hava gjørt.

Umframt Phil Buck verða átta mans við bátinum, og fyrsta dagin ætla teir at leggja frá landi í Kili, har teir eisini hava gjørt bátin. Ætlanin er so, at teir skulu sigla teir næstan 10.000 fjórðingarnar til Sidney í Avstralia, og gongst eftir ætlan, fer ferðin at taka seks mánaðir.

Fyri trimum árum síðani sigldi Phil Buck frá Kili til Páskaoynna, og amerikanski ævintýrarin dylir ikki fyri, at hansara stóra fyrimynd er norðmaðurin Thor Heyerdahl, og at tað var ferðin hjá Heyerdahl við »Kon Tiki«, sum eggjaði sær til at royna at sigla um Kyrrahavið.

## Gjalda fyri vígslur og jarðarferðir

Kirkjan í Bergen er so illa fyri fíggjarliga, at leiðslan hevur skotið upp, at í framtíðini skulu fólk gjalda fyri at verða vígd í kirkjuni. Skulu fólk til gravar úr kikrjuni, skulu teirra avvarandi gjalda fyri tað.

Martin Kulid, kirkjuverji í Bergen, sigur við norska útvarpið, at eftir uppskotinum skulu hjún rinda 805 krónur fyri at verða vígd í kirkjuni, og gjaldið fyri eina jarðarferð verður tað sama. Hann væntar, at hesar eykainntøkurnar fara at geva kirkjuni umleið eina millión krónur um árið.

Martin Kulid sigur, at hóast talan er um eina meirinntøku, er tað ikki nóg mikið til tað, sum vígslur og jarðarferðir kosta kirkjuni.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Bush undirmetir kreppuna við Norðurkorea

**Fleiri týðandi limir í amerikansku Kongressini halda, at stjórnin hjá George W. Bush, forseta fer alt ov lætt um kreppuna við Norðurkorea. Teir krevja, at stjórnin alt fyri eitt fer undir samráðingar við norðurkoreansku stjórnina**

NORÐURKOREA-USA
*Árni Joensen:*

Ótryggu viðurskiftini millum USA og Norðurkorea hava elvt til altjóða ótta, og óttin er serliga stórur í Suðurkorea og Japan, har fólk bera stúra fyri, at norðurkoreanar eru førir fyri at gera kjarnorkuvápn.

Amerikanskir talsmenn hava sagt, at USA hevur lagt hóskandi ætlanir, sum tikið verður til, men Colin Powell, uttanríkisráðharri hevur kortini lagt dent á, at grannalondini hjá Norðurkorea mugu átaka sær teirra part av uppgávuni fyri at tryggja støðug viðurskifti í økinum.

Talsmaðurin hjá Bush, Ari Fleischer, segði týsdagin, at kreppan eigur at verða loyst við samráðingum, og at Suðurkorea, Japan, Kina og Russland eiga at taka lut í hesum samráðingunum.

Men fleiri leiðandi andstøðupolitikarar í USA halda, at stjórnin hjá Bush fer alt ov lætt um kreppuna, sum teir siga vera sera vandamikla. Leiðarin hjá demokratunum í Senatinum, Tom Daschle, segði í gjár, at forsetin eigur at skipa fyri beinleiðis samráðingum við Norðurkorea alt fyri eitt.

- Hóast eg væl dugi at skilja, at stjórnin hugsar mest um Irak í løtuni, undrar tað meg, at hon leggur so lítlan týdning í kreppuna við Norðurkorea, sum kanska er ein uppaftur størri hóttan ímóti okkum og okkara sameindu, enn Irak er, sigur demokratiski senatorurin Joe Biden.

Tað er avmarkað, hvat frættist úr Norðurkorea, men í gjár ljóðaði, at landsins fremsti herovasti, Kim Yong-chan, skal hava biðið landsmenn sínar fyrireika seg til ta endaligu uppgerðina við tað amerikanska hjálandaveldið. Kim Yong-chan sigst hava stóra politiska ávirkan á stýrið í Pyongyang.

# Clinton njósnaðist fyri CIA

**Fyrrverandi amerikanski forsetin, Bill Clinton, njósnaðist fyri CIA, tá hann las á lærda háskúlanum í Oxford**


*Bill Clinton. Var hann njósnari fyri CIA undir Vietnamkrígnum?*

NJÓSNING
*Árni Joensen:*

Bretski tíðindamaðurin Christopher Hitchens vil vera við, at fyrrverandi amerikanski forsetin, Bill Clinton, arbeiddi sum njósnari hjá fregnartænastuni CIA, tá hann las á lærda háskúlanum í Oxford í Bretlandi, har Hitchens eisini las um sama mundið.

Sambært tíðindamanninum kunnaði Clinton amerikansku fregnartænastuna um studentar og onnur, sum vóru ímóti amerikansku krígsførsluni í Vietnam í 1968.

- Ein ella annar gav CIA hesar upplýsingar, og eg haldi fyri vist, at tað var hann, sigur Christopher Hitchens, sum ofta fanst at Bill Clinton tey árini, hann var amerikanskur forseti.

# Royna at taka lívið av sær

**Seinastu tríggjar vikurnar hava fimm fangar í Guantanamo roynt at taka lívið av sær. Síðani fangarnir komu hagar fyri einum ári síðani, hava 15 sjálvmorðsroyndir verið**

FANGAR
*Árni Joensen:*

Í seinastuni hevur ljóðað, at fleiri av fangunum, sum amerikanarar fluttu úr Afghanistan til herstøðina Guantanamo á Kuba, hava roynt at taka lívið av sær, og fyrradagin váttaði amerikanska verjumálaráðið tíðindini.

Í váttanini stendur, at fimm av fangunum hava roynt at taka lívið av sær seinastu tríggjar vikurnar, og at verjumálaráðið hevur biðið læknar og sálarfrøðingar tryggja, at menninir ikki gera sær sjálvum skaða.

Ein talskvinna hjá verjumálaráðnum váttar, at síðani fangarnir komu til Guantanamo fyri einum góðum ári síðani, hava 15 sjálvmorðsroyndir verið.

Umleið 625 fangar úr umleið 40 londum eru í Guantanamo.



# Brandur á Broadway

**Í dag verður Brandur Enni at síggja á Broadway í Íslandi. Áhugin fyri konsertini, sum Brandur skal hava, er stórur. Herfyri hevði heimasíðan hjá Brandi heili 900 vitjanir upp á ein dag, og var meginparturin av teimum úr Íslandi**


*Brandur Enni verður í dag at síggja í Íslandi. Har skal hann hava konsert á Broadway saman við Jóhonnu Gúðrun*

STJØRNUSKOT
*Ingrid Bjarnastein*

Ungi tvørádrongurin, Brandur Enni, skal í dag, leygardag, hava konsert á Broadway í Reykjavík í Íslandi. Har fer hann á pall saman við íslendsku Jóhonnu Gúðrun, sum eisini hevur vitjað í Føroyum.

– Áhugin fyri Brandi vísir seg vera stórur. Herfyri hevði heimasíða hansara 900 vitjanir uppá ein dag, og var meginparturin av teimum úr Íslandi, sigur Steintór Rasmussen, sum er umboðsmaður Brand.

Stakfløgan »Still Friends« verður eisini útgivin í Íslandi í dag, og verður hon væntandi at fáa í Føroyum um eina viku.

Tann 19. februar verður »Waiting in the Moonlight« givin út sum stakfløga í Danmark, og tann 13. mars kemur plátan út har.

Filmurin, »The Way I am« fekk annars góða móttøku, tá hann varð vístur í íslendska Ríkissjónvarpinum her fyri.

– Brandur er sjálvsagt spentur. Tað er ein stórur møguleiki at sleppa at spæla á Broadway, sigur Steintór.

Við sær hevur Brandur seks tónleikarar, tríggjar dansarar, umframt tíðindafólk. Millum annað verður ein tíðindamaður við frá danska blaðnum BT, sum skal fylgja við á konsertini.

Bussleiðin í Havn:

# Færri bussar - sama tænasta

**Bussleiðin í Tórshavnar kommunu er nú umløgd, og hon kom í gildi 1. februar. Leiðin er umløgd á tann hátt, at seks leiðir eru nú blivnar til fýra. Hetta skuldi givið eina verri tænasta, men sambært borgarstjóranum í Havn, Jan Christiansen, verður tænastan tann sama**


*Bussleiðin í Havn er umløgd, soleiðis at fýra leiðir nú røkja tær seks, sum vóru áðrenn. Jan Christiansen, borgarstjóri, heldur ikki, at tænastan er lækkað nakað nevnivert fyritað*

BUSSLEIÐIN
*Solby A. Eliasen*

– Tað er ikki beinleiðis rætt at siga, at Bussleiðin er minkað úr seks niður í fýra leiðir, tí tað er ein umlegging farin fram, sum hevur við sær, at fýra leiðir nú røkka tað, sum seks leiðir rukku áðrenn, sigur borgarstjórin í Havn.

Hann heldur ikki, at tænastustøðið er lækkað nakað nevnivert við hesi umlegging.

– Tá ein Bussleið verður broytt, vilja tað altíð koma aftursvar uppá tað. Og tað vilja altíð verða nøkur, sum ikki eru nøgd við broytingarnar, tí tað verður óhøgligari hjá teimum enn tað var áðrenn, sigur Jan Christiansen og leggur afturat, at tey misnøgdu altíð hoyrast so væl. Tórshavnar kommuna hevur tó eisini fingið teldubrøv frá nøgdum fólki, sum nýta Bussleiðina.

Borgarstjórin í Havn sigur eisini, at tá ein nýggj bussleið kemur í gildi, so merkist tað altíð aftur í inntøkunum ta fyrstu tíðina. Hetta, heldur hann, kemur óivað av, at fólk eru vanabundin, og ein tílík broyting krevur av fólki, at tey skulu tilpassa seg av nýggjum og venja seg við broytingarnar.

– Og tað hevur víst seg, at tað gongur bert ein stutt tíð, so hava fólk vant seg við tað aftur.

Men Jan Christiansen sigur samstundis, at við eini broyting eru tað ofta onkur ting, sum kunnu verða gjørt betur. Og hann sigur, at tey eru opin fyri at gera rættingar, um tað gerst neyðugt. Men hann leggur dent á, at leiðin, sum hon er nú, skal royndarkoyrast í eina tíð, síðani verður samlað upp og hugt eftir, um rættingar eru neyðugar.

– Tað er sanniliga ikki bara sum at siga tað at sita við eini bussleið og skula tilrættisleggja hana, og tá hon so verður umløgd, so kann ein næstan ganga útfrá, at onkur mistøk eru, sum krevja batar, sigur Jan Christiansen.

Bussleiðin varð boðin út seinasta ár, og tað varð gjørt, sambært Jan Christiansen, tí at kommunulógin leggur upp til, at øll størri arbeiði í eini kommunu eiga at verða útboðin.

– Skulu vit fylgja andanum í kommunustýrislógini, so eiga vit at bjóða eina tílíka leið út, soleiðis at øll hava líka góðan rætt at bjóða uppá hana, staðfestir borgarstjórin í Havn, sum ikki heldur, at tænastustøðið á Bussleiðin er lækkað.

Sirkus Arena í Føroyum:

# Fyrstu ferð í tíggju ár

**Danska sirkusið, Sirkus Arena, er í hesum døgum á vitjan í Føroyum. Tríggjar sýningar eru á skránni, ein í Runavík, í Klaksvík og í Havn**

SIRKUS
*Ingrid Bjarnastein*

14 artistar eru komnir til landi við Sirkus Arena úr Danmark. Tey fara um vikuskiftið at hava sýningar kring landið í ávíkavist Runavík, Klaksvík og Havn.

– Tíverri hava vit ikki djór við, men vit hava sett eina serliga skrá saman, sum vit eisini plaga at brúka tá vit eru í Grønlandi, sigur Christian Warrer, sum er talsmaður hjá Sirkus Arena.

Við á ferðini eru klovnar, jonglørar og onnur spennandi fólk, sum fara at geva áskoðarunum eini tveir tímar av undirhaldi.

– Vit vænta nógv glað fólk fara at koma at hyggja. Tey fáa eina stuttliga familjuuppliving burturúr, sum tey kunnu tosa um aftaná. Tað er okkara mál. At geva áskoðarunum nakað, sum teir gerast glaðir av, og síðani kunnu práta um aftaná. Sirkus er fyri øll, sigur Christian Warrer.

Sjálvt um ongi djór eru við, so lovar talsmaðurin fyri sirkusið, at sýningin verður ikki verri enn um djór høvdu verið við. Sama skráin verður brúkt, sum tá sirkusið ferðast í Grønlandi, tí har er jú heldur ikki loyvi at hava djór inn við í landið.

Talan er um vetrarsirkus, sum Sirkus Arena eisini ferðast kring Jútland við um veturin.

– Orsøkin til, at vit koma til Føroya er, at vit hava ikki verið her í eini tíggju ár, og nú hildu at tað var tíð uppá at koma aftur. Eisini tað, at koma til Føroya, er ein uppliving fyri tey, sum eru við, sigur Christian Warrer at enda.

Skráin hjá Sirkus Arena er soleiðis: fríggjakvøld í ítróttarhøllini í Runavík, leygardag í KÍ-høllini í Klaksvík og sunnudagin í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn.


*Sirkus Arena er fyri fyrstu ferð í tíggju ár aftur í Føroyum. Tríggjar sýningar eru á skránni. Ein í Runavík, ein í Klaksvík og ein í Havn*